**NSÍ-EB/Streymur 0-0:**

# Roykur, men eingin grind

**Einki mál kom við Løkin, tá oddaliðið og steypavinnararnir fríggjakvøldið fingu eitt stig í part. Úrslitið er ikki serliga brúkiligt hjá EB/Streymi, ið framvegis er níggju stig aftan fyri NSÍ, sum mikukvøldið vitjar við Margáir**

Hilmar Jan Hansen

NSÍ 3

EB/STREYMUR 3

»Roykur, men eingin grind,« var niðurstøðan hjá einum av teimum mongu áskoðarunum, sum fríggjakvøldið sóu 0-0 dystin millum NSÍ og EB/Streym við Løkin.

Mangan hevur talan verið um góðar dystir millum hesi bæði liðini, ið hava verið í fremstu røð tey seinnu árini, men hóast spælið ikki var tað besta hesa ferð, so var nógv ferð á dystinum mestsum alla tíðina. Tíverri duttu báðir partar í grøvina, ið ofta lokkar í ferðmiklum dystum, so eisini var dysturin merktur av nógvum feilum.

Hvørki liðið fekk serliga ofta og serliga leingi samanhang í spælið hjá sær, tí ferð eftir ferð brutu tey álopsuppbyggingina hjá hvørjumøðrum av, áðrenn tað ordiliga gjørdist vandamikið. Og hóast onkur av skjótálopunum byrjaðu at síggja lovandi út, endaðu tey sjáldan við síðsta sparkinum, ið kundi givið dystinum eitt ella fleiri mál.

Undan dystinum lá størra trýstið á gestunum, tí fyri EB/Streym hevði tað nógv – fyri ikki at siga alt – at siga, at liðið fekk bilbukt við NSÍ, sum í løtuni er langt framman fyri øll hini liðini. Helst skuldu teir bláu og svørtu fáa øll trý stigini, men tað eydnaðist so ikki.




*Jústinus R. Hansen hjá NSÍ og Hans Pauli Samuelsen hjá EB/Streymi dystast um bóltin í dystinum í Runavík fríggjakvøldið, sum endaði við málleysum javnleiki*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Fáir málkjansir

EB/Streymur hevði kanska teir størstu og flestu av málkjansunum í dystinum, men hvørki av liðunum hevði ordiligar 100 prosents kjansir, og sæð yvir allar 90 minuttirnar var hóttanin frá gestunum ikki størri enn so, at NSÍ onkursvegna tóktist hava tamarhald á alla tíðina.

Sorin Anghel spældi í miðverjuni hjá EB/Streymi, har hann helt Christian Høgna Jacobsen í stuttum tjóðri, so toppskjúttin ongantíð veruliga slapp at hótta, men í allarsíðsta minutti í dystinum fekk Sorin ein snudd, so hann noyddist at fara út eftir ein annars stóran innsats.

Frammi á vøllinum royndi Gudmundur Nielsen serliga í fyrra hálvleiki at bjóða dúgliga av í høgru síðu, men uttan at nakað ítøkiligt kom burturúr. Eisini Leif Niclasen, ið var einsamallur heilt frammi, arbeiddi nógv og royndi støðugt at órógva verjuna hjá vertunum, umframt at hann kanska eisini hevði største kjansin í dystinum, men misbrúkti.

Hjá NSÍ fekk Klæmint A. Olsen skaða longu eftir hálvan tíma, so eftir hetta spældi NSÍ við væl ansaða Christian Høgna einsamøllum har frammi, og tá høvdu vespurnar ikki sama broddin. Annars arbeiddu verjan og miðvøllurin – kanska serliga Jústinus R. Hansen – væl hjá vertunum.

## Síðsta útkall

Longu mikukvøldið møtast liðini aftur, tá við Margáir, og tá er avgjørt síðsta útkall hjá EB/Streymi, skal liðið blanda seg upp í oddastríðið. Við sigri kann EB/Streymur klippa munin niður í seks stig, men við tapi ella javnleiki verða 12 ella níggju stig upp til runavíkingar.

Tað skal tó vera løgið, um dysturin mikukvøldið verður enn ein málleys uppgerð, tí neyvan spæla hesi bæði liðini tveir slíkar dystir á rað.

einslistir@kallnet.fo